# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800







*Fiat Qubo 1,3 diesel við turbo og intercoolara. Bilurin er praktiskur við dragihurðum á síðunum*

## Fiat Qubo 1,3 Active

**Motorurin**:
1,3 litra MJT turbodiesel við 75 hk

Snúningsmoment 190 Nm við 1.750 snún/min

| | |
|---|---|
| Oljunýtsla | 22,2km/l |
| CO2 útlát | 119 g/km |
| 0-100 km/t | 16,5 sek |

**Stødd og vekt:**

| | |
|---|---|
| Longd | 395,9 cm |
| Breidd | 171,6 cm |
| Hædd | 173,5 cm |
| Eginvekt | 1.275 kg |
| Viðførisrúm | 329 litrar |

Prísur úr kr. 168.000,-

**Søluumboð**
Nordcar Sp/f
Smiðjugerði 4
FO-100 Tórshavn
Tel. 308080
www.nordcar.fo

# Fiat Qubo
## - við plássi til tað heila

**Fiat eru komnir á marknaðin við einum heilt nýggjum bili. Talan er um Fiat Qubo, sum er ein rúmligur mini MPV við góðum plássi til 5 persónar og teirra viðføri. Bilurin er økonomiskur og hevur lágt CO2 útlát**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Seinasta nýggjheitin frá Fiat er Qubo, sum er ein av hesum modernaðu multibilunum við kassalíknandi designi og eru væl egnaðir bæði sum vørubilar og sum rúmligir familjubilar við plássi til fimm ferðandi og stórum viðførisrúmi.

Tað sum gera hesar bilarnar so væl umtóktar er at teir uttan at fylla so nógv hava pláss til tað heila, samstundis sum teir eru lættir at koyra við í býnum, har tað ofta er trongt og ringt at finna parkeringspláss.

Qubo er uppbygdur sum ein MPV. Hann er lutfalsliga høgur, og setrini eru hægri enn á einum vanligum persónbili, hetta gevur gott útsýni hjá bilføraranum. Umhvørvið hjá føraranum er ergonomiskt rætt og væl umhugsað, sum t.d. at girstongin situr væl fyri í eini gardanboks uppi undir instrumentborðinum. Innrættingin er sera liðilig, og við at leggja baksetrini niður verður Qubo sum ein vørubilur. Viðførisrúmið er stórt við góðum plássi til t.d. súkklu ella barnavogn.

Qubo er væl útgjørdur og hevur fleiri innbygdar trygdarskipanir sum t.d. ABS við ESP, antispinn og Hillholder, umframt EBD (Electronic Brake Distribution), fleiri airbag og tríggjar solidar nakkapútur aftan.

Motorurin er ein 1,3 Commonrail MultiJet diesel við turbo og intercoolara og 75 hk. Hesin koyrir 22,2 km/l og hevur CO2-útlát upp á einans 119 gram/km. Hvat útgerð viðvíkur fæst Qubo í útgávunum Active og Dynamic.




*Qubo er ein av hesum modernaðu multibilunum*



*Qubo er ein rúmligur mini MPV við plássi til 5 persónar*



*Viðførisrúmið er stórt við góðum plássi til ein barnavogn*



*Umhvørvið hjá føraranum er ergonomiskt væl innrættað*